Ferðavinnufelagið

Tórshavn 22. april 2021

Til Vinnunevndina

Vit takka fyri ein góðan fund í morgun og taka aftur íaftur, at vit í Ferðavinnufelagnum eru sera fegin um, at uppskotið nú er komið so langt áleiðis. Eftirspurningurin og tørvurin á einum hjálparpakka til ferðavinnuna er sera stórur í løtuni, tí vinnan hevur so at siga ongar inntøkur av ferðafólki. Ferðavinnufelagið hevur lagt dent á at leingja hjálparpakka 3. Hjálparpakki 3 hevur tó víst seg ikki at vera heilt nøktandi á øllum økjum, og tískil hevur Ferðavinnufelagið gjørt nakrar viðmerkingar aftrat til hjálarpakka 4.

Lønarendurgjaldið til 10 starvsfólk á 27.000
Tulkingin í hjálparpakka 3 hevur verið, at stuðulin, ið latin hevur verið, er 75% ella 50% av 27.000 og ikki 27.000 fyri hvørt lyklastarvsfólk, sum upprunaætlanin var við uppskotinum. Hesari tulking er Ferðavinnufelagið ikki samd við. Ferðavinnufelagið hevur framvegis ta áskoðan, at endurgjaldið fyri kjarnustarvsfólk eigur at vera 27.000, og felagið heldur, at hetta eigur at vera presiserað í hjálparpakka 4.

Gistingarhúsini
Í uppskotinum verður lagt upp til, at umsetningurin skal verða fallin við í minsta lagið 40% fyri at fáa stuðul. Hetta prosenttalið er ov høgt, og Ferðavinnufelagið heitur tí á Løgtingið um at broyta tað til 30%, ið samsvarar við tað, ið danir hava í sínum hjálparpakka.

Ferðavinnufelagið hevur verið í sambandi við gistingarhús, sum ikki síggja út til at fáa ágóðan av hjálparpakka 4. Orsøkin til tess er at tilvísingarskeiðið er í lágarstíð, og tá er gistingarparturin altíð ein minni partur enn í háarstíð. Samstundis hava gistingarhús í hesum døgum lagt seg eftir at økja matstovuvirksemið fyri at halda gongd í virkinum, soleiðis at til ber at varðveita starvsfólk, hóast at vinningurin á matstovuvirkinum er sera lítil, um nakar.

Tað, at fleiri fyritøkur hava sett økt fokus á matstovuvirksemi, ger, at umsetningurin er blivin “ov høgur” – fyritøkurnar røkka tí ikki upp á 40% í mistum umsetningi. Sæð í bakspeglinum skuldi hetta kanska verið gjørt øðrvísi, men tað tykist ikki rætt at verða revsaður fyri at royna at halda fólki til arbeiðis og virkseminum í gongd.

Bruttovinningurin á einum hotellkamari er sum útgangsstøðið áleið 60%. Á mati og drekka liggur bruttovinningurin nógv lægri. Tað veldst sjálvandi um hvat slag av matstovu talan er um, men bruttovinningurin liggur á umleið 10-20. Sostatt sæst, at tað er ikki F&B (Food & Beverage), sum bjargar einum gistingarhúsi.

Vit í Ferðavinnufelagnum mæla tí staðiliga til, at fyritøkur í minsta lagi skulu hava havt eina niðurgongd á 30% fyri at fáa stuðul. Ikki 40% sum nú. 30% er eisini meira í tráð við meinlíkar hjálparpakkar í Danmark fyri fastar útreiðslur.

Útreiðslur til grannskoðarara
Ferðavinnufelagið mælir til, at útreiðslur til grannskoðaraein vera fevndar av hjálparpakkanum. Fyri smærri fyritøkur er hettar ein rímiliga stórur postur, samstundis er tað eitt krav at uppgerðin er grannskoðað fyri at kunna fáa stuðul. Um vit hyggja eftir donsku hjálaparpakkunum, so er hendan útreiðsla fevnd av hjálparpakkanum.

Útbygging av verandi gistingarhúsi – uppgerðin av føstu útreiðslunum
Uppskotið tekur atlit til kapasitetsøkingina hjá bæði nýggjum gistingarhúsum og útbyggingum á verandi gistingarhúsum. Tað fegnast vit um. Tó hava vit eina viðmerking til, hvussu føstu útreiðslurnar skulu

gerast upp, tá ið tað snýr seg um eina útbygging.

Í viðmerkingunum stendur á s. 9, at

"Skotið verður upp, at hevur fyritøka, sum rekur gistingarhúsvirksemi, útbygt gistingarhúsið og økt munandi um gistingarmøguleikarnar, verða umsetningur og fastar útreiðslur fyri nýggja partin av gistingarhúsinum, sum ikki hevur verið tikin í nýtslu í einum tilvísingarskeiði, sum eru nevnd í § 2, stk. 3, nr. 1 ella nr. 2, gjørd upp fyri seg."
Tann parturin, sum snýr seg um umsetningin, er í lagi. Hann loyvir, at til ber at rokna ein mettan umsetning fyri útbygda partin.

Tað, sum tykist vera ein feilur í lógaruppskotinum, er, at eisini føstu útreiðslurnar skulu gerast upp fyri seg fyri útbygda partin. Hetta tykist at vera eitt mistak í fyrsta lagi, tí at í einum útbygdum parti, har lítið og einki virksemi hevur verið, eru sannlíkt fáar fastar útreiðslur annað enn rentur og nakað av el og hita.

Á s. 10 stendur ein stutt orðing í viðmerkingunum til lógaruppskotið um, at tað ber til at flyta verandi fastar útreiðslur yvir til útbyggingina:

"*Hetta lutfallið verður somuleiðis nýtt, tá stuðul skal rindast og føstu útreiðslurnar skulu býtast millum vanliga virksemið og kapasitetsøkingina."*

Henda orðing er tó ikki at finna aftur í sjálvum lógartekstinum. Orðingarnar í lógaruppskotinum peika tí í ymsar ættir viðv. uppgerðini av føstum útreiðslum, tá ið tað snýr seg um úbygging av verandi virksemi.

Ein rímilig broyting av lógaruppskotinum vildi tí verið, at metti umsetningurin av útbyggingini kann teljast við í samlaða umsetninginum fyri fyritøkuna, sum síðani saman við veruliga umsetninginum leggur støði fyri tí stuðulsprosenti, 75% ella 50%, sum felagið fær til veruligar fastar útreiðslur, óansæð um tær hoyra til verandi gamla partin ella kunnu flytast til útbyggingina.

Sagt við øðrum orðum: útbyggingin skal ikki gerast upp fyri seg annað enn, at ein mettur mistur umsetningur verður roknaður út frá útbyggingini. Føstu útreiðslurnar skulu kunnu gerast upp undir einum fyri fyritøkuna, eins og galdandi var í hjálparpakka 3.

Vinarliga
FERÐAVINNUFELAGIÐ

Birita Biskopstø